# Øll uttan Asfalt ætla at skeinkja

**Allir festivalarnir fara at skeinkja, og hava gjørt avtalu um, hvat bryggjarí skal vera umboðað á teirra festivali. Tí verður danskt øl á G! og íslendskt øl á Jòansøkufestivalinum**

SKEINKING

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Festivalfyrireikararnir liggja ikki á tí løtu síðuni í hesum døgum. Fríggjadagin samtykti tingið at liberalisera rúsdrekkalógina so mikið, at tað nú skal vera loyvi hjá teimum, sum framman undan hava eitt skeinkiloyvi at skeinkja til størri tiltøk, eitt nú festivalar. Longu nú hava Jóansøkufestivalurin, Mjús, G! og Summarfestivalurin avgjørt, at tey fara at skeinkja øl.

## Íslendskt og danskt øl

Ølsølan skal sjálvandi vera undir skipaðum og góðum umstøðum, tað eru øll á einum málið um. Men ymikt er, hvat fyri øl verður selt á hesum festivalunum.

Fyrstu festivalarnir eru Jóansøkufestivalurin í Suðuroy og Mjús á Sandoynni. Her er longu avgjørt, at tað verður føroyskt og íslendskt øl, sum skal seljast. Restorff og teirra íslendski samstarvsfelagi, Vifilfell, hava fyri tíð síðani gjørt avtalu við Jóansøkufestivalin og Mjús um, at tað verður teirra øl sum skal skeinkjast har.

- Vit halda at broytingin í rúsdrekkalógini er eitt stórt frambrot, og vit gleða okkum um at sleppa at sleppa at bjóða føroyingum øl aftur við góðum tónleiki til festivalarnar, sigur Jóhan Mortensen frá Restorff. Samstundis sigur Jóhan Mortensen, at hann vónar at teir sleppa at selja dósaøl til festivalarnar, men at hetta ikki komið heilt upp undir land enn.

Á G! hava samskipararnir eisini gjørt avtalu um, at tað verður Royal øl, sum skal seljast á teirra festivali.

- Poul Michelsen er ein av okkara høvuðsstuðlum, og vit fáa allan mat og allar drykkivørur frá teimum. Hetta merkir, at ølið sum verður selt á G! er øl sum Poul Michelsen umboðar.

- Á Summarfestivalinum verður tað Føroya Bjór, sum skal seljast. Tað sigur Steintór Rasmussen, sum eins og allir hinir festivalfyriskipararnir leggur doyðin við, at tað verður selt undir góðum og skipaðum umstøðum.



*Allir festivalarnir uttan Asfalt fara at skeinkja øl (savnsmynd)*

## Onki øl á Asfalt

Asfalt er einasta stóra tónleikatiltakið í summar, sum hevur avgjørt ikki at selja øl.

- Tað avgerina hava vit tikið, tí á økinum har tiltakið er, eru ikki minni enn 16 skeinkiloyvi, og tí vilja vit heldur, at matstovurnar og caféirnar skulu fáa ágóðan av hesum, í staðin fyri at vit fara at liggja og kappast við tey, sigur Bogi Andreasen, ein av Asfalt samskiparunum.




**8 ógloymandi dagar í Suðuronglandi...**

...við spennandi útferðum hvønn dag. Vit kunnu t.d. nevna:

Fríggjadag 14. juli, koma til Stansted, koyra við bussi gjøgnum Hampshire umvegis Winchester til Plymouth, har gist verður.

Leygardagin 15. juli verður farið til St Austell, har hugt verður eftir tí undrunarverda Eden Project. Seinnapartin verður farið víðari til Lanhydrock, einaferð nevnt tað fínasta húsið í CornwallKring húsið er ein undurfagur urtagarður.

Sunnudagin 16. juli verður farið ta stuttu leiðina til St Michael's Mount, ið stingur upp úr sjónum við Mount Bay. Vit vitja eisini á Land's End – vestasta tanga í Bretlandi – hvørs baldruta landslag er ógloymandi.

Mánadagin 17. juli fara vit rannsóknarferð til tær fjarskotnu víkirnar og hugnaligu bygdirnar Looe, Polperro og Falmouth.

Týsdagin 18. juli kekka vit út av hotellinum og koyra til Bournmouth gjøgnum Dartmoor National Park. Seinnapartin vitja vit í Exeter.

Mikudagin 19. juli verður farið tíðliga við bussinum á heildagstúr til Bath, Glastonbury and Wells. Vitjað verður síðani í Bath- ein vælkendur heilsubótarbýur.

Hósdagin 20. juli fara vit við ferju yvir um sundið at vitja Osbourne House, summarhúsið hja Drotning Victoriu.

Fríggjadagin 21. juli verður koyrt beinleiðis til Stansted har fráferðin er við Atlantic Airways kl. 13.15.

Les meira um ferðina á www.atlantic.fo

**Íroknað ferðina er:**

- Flogferðin við ferðaavgjøldum.
- Innivist á 3-stjørnaðum hotellum við stórum enskum morgunmati.
- Døgurði við trimum ræattum hvønn dag.
- Bussur og skandinaviskur ferðaleiðari alla tíðina.
- Allar útferðirnar við atgongugjaldi.

Ikki íroknað: Ferðatrygging, drykkjuvørur og eyka máltíðir.

Kostnaður fyri hvønn í dupultkamari:

**11.898,-**

Eyka kostnaður fyri einakamar:
Kr. 1.575,-

*Depositum kr. 2.000,- verður at gjalda við tilmeldan. Depositum verður afturgoldið, um túrurin verður av ongum.*

*Ferðin er treytað av í minsta lagi 20 ferðandi. Seinasta freist at tekna luttøku er 20. mai.*

ATLANTIC AIRWAYS

Atlantic Airways ger tað stuttligari at liva í Føroyum www.atlantic.fo

**MIKLAGARÐUR**

# STARVSLÝSING

SLAGTARIN

Í nýggja Miklagarði er nógv at gera og tí søkja vit eftir tveimum starvsfólkum.

SLAKTARI / SLAKTARAHJÁLP

Søkt verður eftir slaktara/slaktarahjálparfólki at byrja 1. juni. Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna. Løn sambært avtalu.

FÓLK TIL PAKKIDEILDINA

Slaktarin søkir eisini eftir einum fólki at pakka slaktaravørur. Arbeiðstíðin er 20 tímar um vikuna. Løn sambært avtalu.

SEND UMSÓKNINA TIL

Miklagarður
att.: Jørgen Jørgensen
Postboks 1069
110 Tórshavn